# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10/00200 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 22 | Avgerð tikin: 07.04.2011 |
|---|---|---|

## TAKS sýtt útgjald av rentu. Kæran avvíst vegna vantandi málføri.

**Samandráttur:**

**TAKS hevur av misgáum rindað kr. 20.000.000 ov lítið av negativum mvg aftur til kæraran viðvíkjandi mvg-uppgerðini fyri 4. ársfjórðing 2008. Kærarin verður varur við hetta meira enn eitt ár aftaná, at mvg'ið skuldi verið afturgoldið.**
**Kærarin krevur síðani, at TAKS rindar rentu av hesum mvg-kravinum. TAKS hevur avgjørt ikki at ganga hesum kravi á møti.**
**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur viðmerkt, at krav um rentu og/ella endurgjald er eitt serstakt krav, sum ikki kann metast at vera eitt krav um toll, skatt ella avgjald. Avgerðir hjá TAKS um rentu og/ella endurgjald eru tí ikki fevndar av málsførinum hjá nevndini vísandi til § 22 í omanfyri nevndu lóg. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at avvísa kæruna.**

**Avgerð**

TAKS hevur av misgáum rindað kr. 20.000.000 ov lítið av negativum mvg aftur til kæraran viðvíkjandi mvg-uppgerðini fyri 4. ársfjórðing 2008. Kærarin verður varur við hetta meira enn eitt ár aftaná, at mvg'ið skuldi verið afturgoldið.

Kærarin krevur síðani, at TAKS rindar rentu av hesum mvg-kravinum. TAKS hevur avgjørt ikki at ganga hesum kravi á møti.

**Avgerðin hjá TAKS**
Kravið um renturokning av mvg-útgjaldinum verður ikki gingið á møti.

Viðvíkjandi hesum viðmerkir lógardeildin hjá TAKS, at generelt er at siga, at har lóggávan ikki regulerar spurningin um renturokning, verður rentuspurningur viðgjørdur eftir rentulógini (lov nr. 638 af 21. desember 1977 om renter ved forsinket betaling m.v., som sat i kraft ved anordning nr. 588 af 4. november 1982 og ændret ved anordning nr. 107 af 27. februar 1996). Rentulógin skilur ímillum, um talan er um skuld innan fíggjarrættarliga økið ella aðra skuld. Tá talan er um aðra skuld, verður renta roknað frá stevningsdegi. Víst verður í hesum sambandi til soljóðandi § 8 í rentulógini:

"Hvis pengekrav uden for formuerettens område ikke betales i rette tid, skal rente som fastsat efter § 5, stk. 1 og 2, betales fra den dag, da fordringshaveren begyndte retsforfølgning til betaling af gælden."

Í Danmark er siðvenja at renturokna slík krøv, men er henda siðvenja ikki galdandi í Føroyum. Eitt slíkt krav hevði helst verið renturoknað í Danmark, men støðan er sum sagt øðrvísi í Føroyum.

Samanumtikið hevur lógardeildin hjá TAKS ta fatan, at slík krøv skulu ikki renturoknast fyrr enn frá einum møguligum stevningsdegi.

**Kærarin**
Kærarin heldur fast við, at hann hevur rætt til rentur av upphæddini, sum TAKS av órøttum hevur afturhildið í umleið eitt ár, eftir at kærarin tann 7. februar 2009 sendi TAKS umsókn um endurrindan av meirvirðisgjaldi, sum kærarin sambært kunngerð nr. 77 frá 19. apríl 1993 hevði rætt til.

Uttan at grundgeva nærri fyri hesum vísir TAKS í avgerð sínari á, at slík krøv sambært siðvenju ikki verða renturoknað í Føroyum.

Hesum kann kærarin ikki taka undir við. Kærarin hevur havt eitt fíggjarligt tap, tí kærarin í umleið eitt ár ikki hevur havt møguleika at fáa rentur av einari upphædd á 20 milliónir krónur. Út frá vanligum rættargrundreglum, undir hesum serliga ríkingargrundregluni, hevur TAKS í einum føri sum hesum skyldu at gjalda rentur av upphæddini, ið er afturhildin av órøttum, og sum TAKS hevur havt møguleika at fáa rentur av í umleið eitt ár. TAKS, ið einsamalt eigur feilin, hevur sýnt ein slíkan atburð, at TAKS má vera nærmast at bera ábyrgdina av tapinum, ið kærarin hevur havt.

Kærarin kærir hervið avgerðina hjá TAKS við teirri grundgeving, at avgerðin er skeiv, og at kærarin eigur rætt til rentur av upphæddini í tíðarskeiðnum frá 28. februar 2009 (tá ið peningurin sambært omanfyri nevndu kunngerð átti at havt verið fluttur) til 8. mars 2010 (tá ið peningurin varð fluttur).

**Ummæli frá TAKS**
Málið snýr seg um mvg-uppgerðina fyri 4. ársfjórðing 2008 hjá kæraranum. Mvg-uppgerðin er móttikin 5. februar 2009, innlisin 6. februar 2009, og útgjaldið er farið fram 26. februar 2009.

Í sambandi við útrokningina og innlesingina av uppgerðini er gjørt eitt mistak, soleiðis at kr. 1.734.748 eru innlisnar sum útgjald í staðin fyri kr. 21.734.748.

Um orsøkina til mistakið er stutt at siga, at tá bókhaldið roknaði 75% av kr. 28.979.664 er ein rokni-/innlesingarfeilur hendur, soleiðis at kærarin hevur fingið kr. 20.000.000 ov lítið útgoldið.

Tann 8. mars 2010, t.v.s. meira enn 1 ár aftaná, ger kærarin vart við seg. TAKS fann feilin og rættaði hann sama dag.

Kærarin hevur kravt rentur av upphæddini, tvs. av teimum kr. 20.000.000.

TAKS hevur boðað frá, at eingin heimild er í mvg-lógini at renturokna upphæddina. Umbønin verður tí ikki gingin á møti

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sambært § 22 í lóg um toll- og skattafyrisiting viðger Skatta- og avgjaldskærunevndin toll-, skatta- og avgjaldskærur.

Kærarin hevur sett eitt krav fram mótvegis TAKS um rentu viðvíkjandi einum kravi um útgjald av negativum mvg.

Krav um rentu og/ella endurgjald er eitt serstakt krav, sum ikki kann metast at vera eitt krav um toll, skatt ella avgjald. Avgerðir hjá TAKS um rentu og/ella endurgjald eru tí ikki fevndar av málsførinum hjá nevndini vísandi til § 22 í omanfyri nevndu lóg.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at avvísa kæruna.**